## Nýggjur málmaður í AaB



Eftir at Jimmy Nielsen fyrr í ár valdi at skifta til enskan fótbólt, hevur felagið hjá Jón Róa Jacobsen og Súna Olsen, AaB, leitað sær eftir nýggjum málmanni. Tað hevur nú eydnast teimum at finna ein málmann, og talan er um 32 ára gamla Karim Zaza, sum hevur drúgvar royndir úr bestu donsku deildini. Zaza, sum er føddur í Marokko, hevur nevniliga leikt yvir 200 dystir í bestu donsku deildini fyri FCK, OB og Brøndby.

## Kroati til Arsenal

Enska Premier League felagið Arsenal kunngjørdi í gjár, at teir høvdu gjørt eina fýra ára avtalu við kroatiska áleyparan Eduardo Da Silva, sum kemur til felagið frá Dynamo Zagreb í Kroatia. 24 ára gamli Da Silva kom til Kroatia sum 15 ára gamal, og í 2002 fekk hann kroatiskan statsborgararætt. Eftir hetta hevur hann spælt 12 landsdystir fyri Kroatia. Annars kann leggjast afturat, at Eduardo Da silva var fyrsti maðurin, sum skoraði á nýggja heimavøllinum hjá Arsenal, The Emirates Stadium, í einum týðandi dysti. Hetta var í Champions League undankappingini síðsta summar.

# Klassamunur frá Pál til hini

**Pál Joensen knústi alla mótstøðu, tá hann í 1500 metra frí svam 23 sekund skjótari enn næsti svimjarin**

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tað var ein løta hjá Pál at bíða, áðrenn hann slap úr hylinum. Hinir svimjararnir skuldu jú first koma á mál*
*Mynd: Jákup*

Longu í fyrstu finaluni á fyrsta svimjikvøldinum vunnu Føroyar gull. Pál Joensen byrjaði svimjingina í geil fýra sum best seedaða svimjarin, og tað stóð eisini skjótt greitt, hví so var.

Fyrstu longdirnir royndu tríggir svimjarar at fylgja føroyinginum, men hóast hesir av og á voru á odda, so rein hetta ikki við Pál. Hann bara svam sítt egna tempo, og so hvørt, sum teinurin øktist, øktist munurin til næstu menninar eisini. Somikið væl, at Pál við eini tíð, sum var 23,08 sekund skjótari enn næsti maðurin kundi rinda sær møðina, meðan hann bíðaði eftir, at restin av feltinum kom í mál.

Tá kundu hesir so bara staðfesta, at teir so ruddiliga høvdu hitt sín yvirmann. Og at tíðin so eisini var til bæði føroyskt og Oyl-met gjørdi ikki staðfestingina minni.

- Tað gjørdi sjálvandi ikki dagin verri, at metini vóru tikin, men tað var í øllum forum tað, sum var meiningin. Og tað hevði eg eisini væntað sjálvur.

Men hylurin er ikki tann besti at seta met í?

- Nei. Hann er hasar 17 sentimetrarnar ov langur, og yvir 1500 metrar gevur tað ein tein upp á 10 metrar, sum eg skal svimja longer, enn eg skuldi gjørt. Hartil spæla vindur og hiti eisini inn, so tíðin kundi kanska verið skjótari. Men er eri nøgdur.

Við somikið stórum muni til næsta svimjaran, var eingin, sum veruliga kundi trýsta Pál at svimja sítt allarbesta. Í øllum forum eingin annar, enn svimjarin sjálvur.

- Tað ræður bara um at halda sína egnu ferð, og gloyma alt um hinar svimjararnar. Og so kanst tú møguliga seta tær mál um, at tú skalt vinna ein bana aftur á onkran av hinum, segði ein væl nøgdur Pál Joensen.

| Føroysku finalurnar | | |
|---|---|---|
| **1500 metra frí, menn** | | |
| **Svimjari** | **Tíð** | **Pláss** |
| Pál Weihe | 15.48,25 | 1 |
| Høgni Miné Rasmussen | 16.48,40 | 6 |
| **100 metra firvald, kvinnur** | | |
| Shaila millum Garðarnar | 1.08,70 | 6 |
| **50 metra bringa, kvinnur** | | |
| Malan Bærentsen | 35,17 | 5 |
| Karina Petersen | 36,17 | 8 |
| **50 metra rygg, menn** | | |
| Kári á Høvdanum | 27,57 | 4 |
| **200 metra frí, menn** | | |
| Elspa Mørkøre | 2.05,35 | 2 |
| Jutta Thomsen | 2.07,56 | 4 |
| **4X50 metra frí, kvinnur** | | |
| Shaila millum Garðarnar | 1.49,53 | 1 |
| Mona Simonsen | | |

# Áttu sekund til góðar



*Sólin var sett, tá seinastu heiðursmerkini vórðu handað føroysku mansstafettini mánakvøldið. Men í dag er ein nýggjur dagur – vónandi við enn fleiri heiðursmerkjum*
*Mynd: Jákup*

**Kári á Høvdanum, Beinir Danielsen, Pál Joensen og Kristian Olsen tóku nógv av mótstøðuni á bóli, tá teir svumu gull heim í stafettini. Men sjálvir vóru teir ikki bilsnir**

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Blandaða svimjingin hevur annars fleiri ferðir staðið í skugganum av crawl-stafettini hjá Føroyum, men mánakvøldið var hetta so eingin trupulleiki. Og føroysku svimjararnir vóru skjótir at staðfesta, at hetta aheilt avgjørt var málið.

- Tølini søgdu, at vit skuldu klára tað. Svumu vit allir til okkara besta, so høvdu vit fýra sekund til góðar í mun til tað, sum hinir svumu í morgun. Tá var líkt til, at hinir veruliga kýttu seg, so vit vistu, at vit kundu røkka gullinum.

Í hylinum gekk tó ikki heilt so lætt. Tríggjar teir fyrstu teinarnar vóru Føroyar á øðrum plássi, men Pál Joensen togaði nógv inn í firvaldinum, og so kundi Kristian Olsen spurta seinasta pettið heim.

- Munurin var nú ikki so stórur. Skiftið hjá Beini gekk ikki so øgiliga væl, men tað hjá Kristian líktist næstan einum tjóvstarti, so har varð nakað vunnið aftur. Í eini 4X50 kann øgiliga nógv henda, og tíbetur riggaði tað so hjá okkum at vinna gullið at enda.

Gullið var tað triða føroyska á degnum, og føroysku svimjararnir ásannaðu, at nú eru vónirnar til teirra avrik skrúvaðar nakað upp.

- Nú eru vit flúgvandi. Í øllum førum haldi eg, at eg tori at siga, at tað verða í øllum førum meira enn tríggjar. Sjálvi høvdu vit at byrja við tosað um tíggju, men so var onkur, sum helt, at vit ikki skuldu leggja ov stórt trýst á okkum sjálvi. Tí varð málið sett niður til fimm, og tað eiga vit í øllum førum at klára, helt Kristian Olsen, tá hann fekk seinasta orðið.